LANDSROYND 6. FLOKKUR

mai 2008

# Føroysk fyrisøgn

(Fyrst verður fyrisøgnin lisin í síni heild fyri næmingunum. Síðani verða teir einstøku partarnir millum skrástrikurnar lisnir tvær ferðir. Orðini við feitari skrift eru tey orð, ið næmingurin skal skriva. Loyvt er næmingunum at hava við sær til royndina orðalistar og orðabøkur, sum verða nýtt í vanligu undirvísingini í føroyskum í 6. flokki).

**Jógvan hevur fingið / ein fittan** hundahvølp. **Hann hevur** leingi / ynskt **sær hund,/ og í** gjár **kom pápin / til** hús **við einum** hvítum / **og svørtum** hvølpi, / **sum hann hevði / fingið frá** einum vinmanni./
**Jógvan var sum vera** man / glaður **fyri** hvølpin. / **Hann fór eftir eini** kurv, / **ið hann legði / lítla** hvølpin **í**. / **Mamman** vildi **hava** / kurvina **í** køkinum, / **men har stóð / hon ikki** leingi, / **tí tá ið Jógvan** fór / **inn í kamarið, / hevði hann** kurvina / **og** hvølpin **við sær.**/
**Jógvan liggur í** songini / **og hyggur eftir** hvølpinum. / **Hann** kennir **seg so** glaðan./ **Hann kínir** hvølpinum, / **sum liggur og** / ringir **seg saman í** kurvini. / **Jógvan er** errin **av, / at hann nú er** hundaeigari. / **Besta** vinkona hansara, **Hanna,** / hevur **altíð** átt djór. / **Hon** eigur **ein** stóran **hund,** / **tvær kettur og** tvær **ryssur.** / **Henni** dámar **so væl at** ríða./

**Jógvan tekur** fartelefonina / **úr** lummanum. / **Hann sendir Honnu** eini sms-boð,/ **har ið hann** biður / **hana** koma **til sín,** / **tí hann** hevur / **nakað stuttligt at** vísa henni./ **Jógvan** hevur **ikki** / meira **enn sent** boðini, / **so er** svar **á hansara** telefon. / **Jú, hon kemur** beinanvegin./
**Hanna er** skjót. / **Jógvan vísir** henni hvølpin, / **ið hann** longu hevur **kallað Snar.**/ **Hanna fer yvir til** kurvina / **og tekur Snar upp.** / **Sum hann er** mjúkur **og** fittur./ **Hon leggur** / **hann aftur í** kurvina / **og ger seg til at fara.** / **Tey gera av** / **at** hittast **aftur um kvøldið.**/